# Lønarlisti

A-inntøka má undir ongum umstøðum gjaldast løntakara beinleiðis í hondina, men skal ávísast gjøgnum eitt góðkent avrokningarstað (bankar, sparikassar, postverk v.m.).

Skjølini mugu fyllast út gjølliga (virkistøl, persónstøl, upphæddir v.m.) fyri at tryggja rætta ávísing av A-inntøku.

Um ávísta upphæddin ikki er tøk á avrokningarstaðnum samstundis sum lønarlistin ella lønarávísingin verður latin inn har, kann hetta føra við sær, at lønarávísingin ikki verður framd.

Ávísingarskyldugi skal bóka hvørja ávísing av A-inntøku í roknskaparbók ella í vanliga bókhaldi sínum, og skal løntakarin hava skrivliga fráboðan um hvørja ávísing av A-inntøku.

TAKS hevur í hesum sambandi gjørt eina roknskaparbók til lønarroknskapin.

Hann, ið ivast í, hvussu lønarlistin skal verða førdur ella um avmarking av A-inntøku og B-inntøku, kann venda sær til eina av hjá TAKS.

Skrásetingarnumrini hjá avrokningarstøðunum eru:

| | |
|---|---|
| P/F Føroya Banki | 6460 |
| Føroya Sparikassi | 9181 |
| Norðoya Sparikassi | 9865 |
| Suðuroyar Sparikassi | 9870 |
| Postverk Føroya | 9909 |

**Navn á avrokningarstaði** **Skrá.nr.**

Her verður skrivað navn á avrokningarstaði, sum lønarlistin verður latin til, (bankar, sparikassar, postverkinum, v.m.), og skrásetingarnummarið.

**Lønarskeið:** Tíðarskeiðið, lønin er fyri.

**Virkistal**

Øll virki, ið ávísa løn, skulu verða skrásett hjá TAKS við einum virkistali. Hetta tal skal setast í henda teig. Um so er, at arbeiðsgevari ikki er skrásettur hjá TAKS, skal hann skráseta seg beinanvegin.

**Kontunr. hjá arbeiðsgevara**

Her verður kontunummarið hjá arbeiðsgevaranum skrivað, haðani lønirnar skulu flytast av.
Um arbeiðsgevarin, í staðun fyri at flyta lønina av eini kontu í peningastovni ella postverkinum, flýggjar lønarlistan til avrokningarstaðið saman við peninginum, sum skal útgjaldast í løn, skal hann einki seta í henda teig.

| Løntakaranavn | P-tal | Skrá.nr. | Kontunr. | A-inntøka | | | Forv. upph. | Skrá.nr. | Kontunr. | Frítíðarløn |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| JANUS JANUSSON | 610551-399 | 9181 | 0001515 | 2.700,- | | | 2.500,- | 6865 | 2998011 | 276,75 |
| HERMANN BRIMPLÁSS | 951044-215 | 6450 | 0000123 | 9.983,- | | | 9.983,- | 9460 | 2981302 | 1.023,25 |
| HANNA EIÐISVATN | 810650-002 | | KONTANT | 5.500,- | | | 6.000,- | | | |

Fyrst skal ásetast navn og p-tal løntakarans. Tað er av avgjørdum týdningi, at p-tal løntakarans er við, og at hetta er rætt.

Síðani kemur skrásetingar- og kontonummar løntakarans, sum lønin skal flytast á.

Skal peningurin útgjaldast kontant ella um lønútgjaldstovu, verður tað skrivað her.

A-inntøka og forvunnin upphædd verða síðani sett í næstu teigarnar. A-inntøka er samlaða bruttoløn løntakarans, sum skatturin verður roknaður av.

Harafturat kann koma onnur viðbót, sum løntakarin skal hava, men sum ikki er skattskyldug, og møgulig krøv, arbeiðsgevarin hevur móti honum. Hesar upphæddir skulu ávikavist leggjast afturat og dragast frá A-inntøkuni, og verður tá komið fram til forvunna upphædd.

Næsta skrásetingar- og kontunummar viðvíkir teirri kontu, har frítíðarlønin hjá teimum tímaløntu skal flytast á. Listi yvir hesar kontur er til skjals á peningastovnunum, ella upplýsingar kunnu fáast frá TAKS.

Frítíðarlønarupphæddin verður síðani sett í teigin uttast til høgru.

Frítíðarlønarupphæddin má ongantíð leggjast afturat A-iintøkuni.

At enda skulu upphæddirnar teljast saman, og lønarlistin skal undirskrivast av arbeiðsgevararnum.